# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SNORRI HEVUR DUGNAÐ DUGNA




Tað var ein hátíðarliga løta á Listasavni Føroyar í gjár, tá Dugni handaði fyrstu Kærleikskúluna í ár – og tá Snorri Brend, blaðmaður á Sosialinum fekk hendan heiður. Sum Johan Samuelsen, formaður í Dugna, segði, so verður Kærleikskúlan latin einum, sum hevur verið ein virðilig fyrimynd, sum onkursvegna hevur dugnað arbeiðinum hjá Dugna. Tað hevur Snorri Brend gjørt í nøkrum positivum blaðgreinum í Sosialinum í ár um fýra fólk við breki, um teirra gerandisdag, førleikar og styrkir. Í grundgevingini fyri at heiðra Snorra Brend varð sagt, at *»hann hevur gingið undan og víst á fjølbroytni menniskjans. Hann hevur megnað at lýst førleikarnar og styrkirnar hjá persónum við breki sum eitt tilfeingi í samfelagnum.«* Sagt varð eisini, at slíkar blaðgreinar eru við til at bróta fordómar niður og eru við til at menna kjakið, fólki við breki at gagni. Í Miðlahúsinum er vit bæði stolt og fegin um, at hesin heiður varð sýndur okkara fólki. Vit ynskja Snorra Brend hjartaliga tillukku við heiðrinum, og vit eru ikki sørt errin um at »eiga« ein part í hesum heiðuri. Vit vilja fegin vera við til at lyfta hesa uppgávuna, sum tað er at upplýsa um viðurskifti hjá okkara medborgarum, sum ikki hava somu rættindi, sum tey flestu. Tí tað er ikki annað enn skyldan hjá fjølmiðlum at virka fyri, at allir borgarar hava somu rættindi og somu møguleikar, hóast likamlig ella sálarlig brek. Men vit mugu viðganga, at eitt nú hjá blindum, deyvum, menningartarnaðum og rørslutarnaðum annars manglar so ómetaliga nógv fyri at fáa gerandisdagin at virka á sama hátt, sum hjá teimum, sum ikki bera brek. Formaður í Dugna spurdi, um tað veruliga er neyðugt, at vit í Føroyum skulu viðtaka eina handicapkonventión frá ST fyri at tryggja, at mannarættindini eisini eru galdandi fyri menniskju við breki. Og hann svaraði sjálvar, at tað er tað so avgjørt. – Sjónlig rættindi eru betur enn ósjónlig, segði hann og vísti á, at tað er sjón fyri søgn at áheitanir og góður politiskur vilji ikki ført til, at fólk við breki hava fingið javnrættindi í Føroyum anno 2010. Tað er ikki sørt snópisligt fyri eina so lítla fólkaræðisliga skipan sum Føroyar, at vit skulu trýstast av øllum øðrum heimsins tjóðum fyri at veita fólki við breki javnbjóðis rættindi. Og vit, sum erpa okkum av, hvussu góð vit eru hvør við annan í hesum lítla og friðarliga samfelagnum Føroyar. Hetta eigur at geva okkum øllum rættiliga nógv at hugsa um...

# Tá fakfelagið verður størsti fíggindin hjá starvsfólki



Umsíðir tók tað stóra fakfelagið, Føroya Fiskimannafelag, í egnan barm og bað um umbering fyri at hava brotið øll virðilig fakfelagsrættindi, tá Jan Højgaard, formaður felagsins, burturvísti Olafi Johansen og insinueraði, at hann hevði gjørt okkurt kriminelt.

Hetta málið er sera sera løgið. At eitt fakfelag – stuðlað av Samtaki, soleiðis ger seg inn á tey mest grundleggjandi rættindi, sum eitt starvsfólk hevur, í hesum føri skrivarin í Fiskimannafelagnum, líkist í øllum førum ikki virðiligum fakfelagspolitikki – hetta er akkurát tað, sum er andsøgnin til eksistensin hjá fakfeløgunum.

Men í gjár kom so umberingin frá Fiskimannafelagnum. Og hon er soljóðandi:

*»Nevnd og formaður í Føroya Fiskimannafelag vátta, at fyrrverandi skrivstovumaður felagsins gjørdi eitt gott arbeiði fyri felagið, og hevði stóra vitan á sínum øki. Vit muga ásanna, at mannagongdin í samband við burturvísingina ikki var røtt og skuldi ikki verið so. Vit harmast um, at hetta hevur elvt til, at Olaf Johansen er settur í ringt ljós millum manna. Vit vilja við hesum biða Olaf og hansara avvarðandi um umberðing fyri tað, tey hava verið ígjøgnum. Vit takka Olaf fyri 35 ára starvstíð í Fiskimannafelagnum.*

*Vit vilja við hesum skrivi vóna, at øll skriving og kjak um hetta mál fær ein enda, Fiskimannafelagnum at frama.«*

Tað undrar okkum stórliga, at Samtak stuðlar slíkum fakfelagsskaðiligum virksemi - tá Fiskimannafelagið soleiðis etur allar ákærur í seg aftur.



## Eg eri ikki ráðgevi hjá landsstýrinum

JØRN ASTRUP HANSEN
KJAK Á SÍÐU 26



## Dugni heiðraði Snorra

REPORTASJA
REPORTASJA SÍÐA 24-25



Mynd: Ólavur Frederiksen

# Jólahugni í Viðarlundini

Sunnudagin Lions Club Tórshavn fyri árliga jólahugnanum í Viðarlundini í Havn. Ágóðin fer hesaferð til átakið, »Í menniskjum góður tokki«.

Tiltakið verður nú sunnudagin frá klokkan 14 til 16.30, og á skránni er jólahugni í orðsins breiðastu merking.

Á hvørjum ári er tiltakið sera væl vitjað, og Lions Club Tórshavn vónar og væntar, at so verður hesaferð eisini. Longu leygardagin verður gjørt klárt, bæði við tilfari til og við at gera jóladekoratiónir, ið bæði tvey kunnu fáast til keyps í Viðarlundini sunnudagin, eins og brenni eisini verður tað.

Sum vanligt, verður ymiskt til undirhalds, tí enn eina ferð kemur Havnar Hornorkestur at spæla, umframt at jólamenn eisini vitja við onkrum góðum til børnini. Somuleiðis ber til at keypa kakao, bollar, vaflur og sunkist í Viðarlundini, har fleiri sølustøð verða.

Alt økið verður pyntað við ljósketum, ið vera hongdar upp í greinarnar. Eisini verður hugnaligt bál, og í sjálvari ánni verða eisini ljósbluss. Syrgt verður somuleiðis fyri, at bæði børn, ung og tilkomin kunnu byrja jólastákanina og adventina við góðum hugnaligum jólatónleiki.

Talan er um eitt tiltak, ið er fyri alla familjuna, samstundis sum fólk kunnu stuðla einum góðum og vælgerandi endamáli. Hesa ferð fer ágóðin til átakið, »Í menniskjum góður tokki«, sum hjálpir børnum í familjum við truplum fíggjarligum korum, so tey kunnu halda eini virðilig og góð jól.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*